gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Løgmansevni

Tað gleðiliga hendi í farnu viku, at eitt nýtt vikublað kom á marknaðin. Tað er eitt kærkomið innslag í føroyska blaðheiminum, og vit vilja hervið ynskja Fregnum tillukku við fyrstu útgávuni.

Stórtíðindini í síðstu viku vóru, at triði hvør sambandsveljari vildi hava Lisbeth Petersen sum løgmann, og var hettar sambært nýggja óhefta vikublaðnum sera væl klárað av Lisbeth. Hon varð framstillað sum alternativ til núverandi løgmann eftir at hava vunnið seg fram í stórum til at heili 7,7% av veljaraskaranum vilja hava hana til løgmann! Helst eiga vit at venda tí við og spyrja, hví bert triði hvør sambandsveljari vil hava Lisbeth til løgmann, og hvønn hinir sambandsveljarar vilja hava til løgmann. Hetta er ein trupulleiki fyri Sambandsflokkin, at undirtøkan hjá egna floksformanni er so lítil.

Trupulleikin er sjálvsagt minni, enn hann kundi verið, eftirsum Javnaðarflokkurin sum støðan er í løtuni eigur løgmansalternativið til Anfinn Kallsberg, nakað sum óhefta vikublaðið av einari ella aðrari orsøk gjørdi rættiliga lítið burturúr. Gleðiligt er, at loysing-samband blokkpolariseringin ikki er so sterk, sum fryktast kundi, nakað sum óhefta vikublaðið, so løgið tað ljóðar, heldur ikki hefti seg stórvegis við.

Neyvan er 100% undirtøka til formannin í nøkrum flokki, men hví vilja bert 12% av samlaða veljaraskaranum hava formannin í størsta flokki til løgmann? Tað tykist sum, at sjálvt Tjóðveldisveljarar heldur vilja hava ein fólkafloksløgmann enn teirra egna. Hetta tykist serliga margháttligt, tá ein eygleiðir gongulagið í samgonguni. Man hevur hoyrt um fólk, ið fáa fragd av at verða pínd, men máti skal vera við øllum. Margháttligheitin gerst ikki minni, tá man hevur í huga, at størsti parturin í Tjóðveldisflokkinum letst hava vinstravend sjónarmið.

Tvinnir eru kostirnir sum støðan er í dag – Anfinn Kallsberg ella Jóannes Eidesgaard. Kanska hvørgin er fyrsta val hjá einum stórum veljaraskara, men tó er greitt, hvønn man skal velja, um liberalistiska láglønarsamfelagið skal gerast veruleiki við stórstílaðari forering av landsognum, og hvønn man skal peika á, um samfelagið skal mennast eftir skandinaviska vælferðarleistinum.

Annar umboðar ein flokk, ið sigur seg ikki taka undir við einum samhaldsfastum samfelag, meðan hin tekur undir við einum samfelag eftir samhaldsføstum prinsippum. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Merkið á ting

**Edvard Hermansen**
*formaður Landsfelags Sjálvstýrisfloksins*

Tað mundi falla øðrum enn mær fyri bróstið, at síggja niðrandi viðmerking løgtingsformansins til uppskot Sjálvstýrisfloksins um at fáa Merkið inn í løgtingssalin. Hesin er maðurin, sum av flokki sínum og er litið hægsta starv í landinum í hendi. Flokkurin, ið ber tjóðveldi og frælsi í skildri, virðir ikki stríð og strev fedranna fyri Merkinum so frægt, at hann unnir tí heiðurssess á tingi.

Hvør siðvenja føroyinga er, tá um Merkið ræður, er kanska ilt at siga. Tað er misjavnt úr bygd í bygd og frá manni til mans. Men virðingin fyri tí er, hóast alt, stór. Tí átti tí eisini at verðið sýndur allan heiður av landsins tingi og stýri. Merkið átti at veitrað á Tinghúsvøllinum allar dagar, sum Tingið er saman. Tað átti so sanniliga eisini at veittra úti á Tinganesi, at heldur ikki teir megu missa stavnhaldið úr eygsjón.

Tað var fyri Merkinum, at menn brutu nasar og vórðu sektaðir. Tað var undir Merkinum, at menn sigldu vandasjógv og settu lív og heilsu í váða. Og fyri mangan góðan landsmann, var Merkið seinasta heilsan, ið hann sá, áður enn fíggindin gav skútuni banasár og sendi manningina út í óvissu og deyða.

Løgtingsformaðurin átti at tikið flaggsøguna til sín, tí ivaleyst hevur hann lisið bók N. J. Arge, sála; hon talar sanniliga til allar føroyingar og átti eisini at talað til tjóðveldismenn. Tað var tann tíð, at menn lótu flaggstongina á Tinghúsvøllinum standa nakna heldur enn at flagga við Danabrók. Tað er at skilja, men at menn í dag hveppa seg við at taka okkara egna flagg til sín, tað er ikki til at skilja.

Merkið er ein týðandi partur í frælsisstríði okkara. Ein heimsbardagi kom tí til hjálpar, stytti um eitt eljustríð og gav okkum Merkið til eyðkennis um egnan samleika.

Í dag kvøða allir føroyingar Merkinum hilniskvæði, allir uttan ein, ella …..?

# Er landsstýrið í kreppu?

**Andras Miðskarð**



Tá ið hesin spurningur verður settur, er tað út frá teirri sannroynd, at øll tey krepputiltøk sum vórðu sett í verk, tá ið landið fór á húsagang fyrst í nýtiárunum, standa við enn, og eru einki broytt.

Hví eru kreppulógirnar ikki broyttar? Hvat ætla fíggjarmálastýrið og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum at gera við hetta?

Vit skattaborgarar eru eftir hondini troyttir av at hoyra politikarar (eisini í samgonguni) tosa um skattalættar. Hvar eru hesir skattalættar? Og hví bleiv rentustuðulin lækkaður?

Væl veit eg at talan "einans" var um 4%, men hjá teimum, sum skylda eina heila millión, er hetta ein stór upphædd. Eisini hevði tað munað væl hjá okkara pensionistum um áðurnevndu krepputiltøk høvdu verið sett úr gildi.

Tó skal andstøðan í løgtinginum hava tøkk fyri teirra royndir at gera tað liviligari í okkara samfelag.

Nú standa samráðingar fyri durum, og er tað mín vón, at tit fakfelagsleiðarar standa sum ein maður. Tit mugu hugsa um, at tingmannalønirnar eru í hesum valskeiðinum hækkaðar við 60 %, og tí er tað ikki ov nógv kravt, at palleba fær helvtina av hesum (30%).

Hví skulu føroyingar gjalda fyri kreppulógir, tá peningurin sum inn kemur, fer til uppsparing til eitt fullveldi, sum meirilutin av Føroya fólki ikki vil hoyra um? Samgongan torir ikki til fólkaatkvøðu, tí hon ræðist veljarafjøldina, og samgongan heldur saman, tí hon ræðist eisini løgtingsval.

Nú ljóðar, at fólkatingsval kann verða útskrivað hvørja løtu. Ein fær seg ikki til at trúgva, at nakar av samgonguflokkunum stillar upp til komandi fólkatingsval eftir orrustuna, teir hava skapt millum Danmark og Føroyar.

Mín áheitan skal tí vera: Takið øll krepputiltøkini av, og hækki rentustuðulin aftur til tey 48 prosentini, nú húsaprísirnir aftur hækka. Verður gjørt eftir hesi áheitan, verður aftur liviligari her á landi.

# Fimm lokið prógv

YRKISÚTBÚGVINGAR

Hesir fimm lærlingarnir hava lokið hesar yrkisútbúgvingar:

Magni Jacobsen, Syðrugøta, hevur tann 31. desember 2000 lokið yrkisútbúgving sum timburmaður. Lærupláss: Eiler Jacobsen, Timburmeistari, Syðrugøta.

Henny Højgaard, Rituvík, hevur tann 24. januar 2001 lokið yrkisútbúgving innan smásølu. Lærupláss: sp/f Teldutænastan, Tórshavn.

Eyðun Simonsen, Tórshavn, hevur tann 31. mars 2001 lokið yrkisútbúgving sum elektrikari. Lærupláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn.

Rúni Samuelsen, Tórshavn, hevur tann 31. mars 2001 lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn.

Oddvá Kristiansdóttir, Saltnes, hevur tann 31. mars 2001 lokið yrkisútbúgving innan skrivstovuyrki-fyrisiting. Lærupláss: P/F KJ-Hydraulik, Kambsdalur.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Orð aftur til Eyðun

**Ólavur Hátún**



Góði Eyðun!

Ikki er tað *móti betri vitandi*, tí at eg eri gloymskur ella g*angi ørindi fyri nakran*, at eg ikki fái tikið undir við tær í tí, at *"kirkjan og skúlin við medvitnum virki yvir hálvtannaðhundrað ár hava beint fyri gamla føroyska kvøðingarlagnum"*, hvat tú so leggur í tað. Av egnum royndum veit eg væl, at lærari, sum fyrr vildi kvøða og dansa við skúlabørnunum møtti mótsøðu hjá ávísum trúarbólkum. Aðalorsøkina haldi eg vera, at tann brennivínsólevnaður, sum nógvastaðni tók seg upp í nýggju dansistovunum tá um aldarskiftið, misskiljandi hevur verið lagdur sjálvum dansinum til sakar, og at fólk tí framhaldandi hava viljað honum til lívs. Men hendan trongskygda hugburð hevur kirkjan sum so ongantíð havt.

Okkara fólkaskúli hevur frá sínum uppruna verið danskur í sínum innihaldi og hevur ikki havt áhuga og ans fyri serføroyskum viðurskiftum. Men nakað medvitið fyribeiningarvirksemi hevur skúlin ikki framt í hesum máli, um enn hann ikki fyrr enn nú er farin at síggja sær eina beinleiðis uppgávu í tí at vera við til at veita okkara aðal mentanararvi framhaldandi livilíkindi.

Nógv eldri fólk vita eisini at siga frá, hvussu tey sum børn í vetrarveðri dansaðu í skúlagongini í fríkorterum.

Tú setir fram spurningin, um eg man vera vorðin *tónadeyvur*, og leggur meg og aðrar musikkpedagogar undir at ganga við *"klaviaturi skorað fast millum oyruni" og tískil ikki at hava ans fyri tónum, sum ikki rúmast á hesum ljómborði.* Tonalitetskenslan í fólkinum hevur allar dagar broytt seg, og tú skalt ikki bjóða til at fáa fjøldina at syngja sokallaðar "bláar tónar" aftur. Hetta mátti heldur ikki verið nakað at drigið fram í umtalu av gomlum kvøðingarlag, sum tú sigur vera burturbeint uttan nærri at lýsa, hvat tað er, sum tú meinar við.

*At orglini í kirkjunum skulu hava havt týnandi leiklut fyri kvøðingarlagið er burturvið.* Kingosangurin mátti lúta fyri nýggjari sálmasangi; men tað hevði onga ávirkan á kvøðing í dansi.

Um enn tað má vera at ynskja eftir, at framvegis verður yrkt í kvæðastíli, so hevði tað ikki verið ríkandi fyri okkara sangmentan, um tjóðskapaskøldini einans hildu seg til tey fábroyttu ørindiskøg, sum kvæðaarvurin hýsir. At vit hava verið fyri størri mentanarligari ávirkan úr Danmark enn gott er, kunnu vit vera samdir um; men hinvegin fremur tað onga menning bara at steingja seg inni við sínum, og t.d. vísa komponistanøvn sum Weyse, Heise, Nutzhorn, Schulz, Kuhlau. Gebauer o. fl., hvussu danskt sanglív í sínum lag eins og føroyskt seinni hevur fingið íblásandi íkast uttanífrá. Tú nevnir Hans Arvesen millum útlendsk tónaskøld. Arvesen var hálvur føroyingur og skrivaði løg til føroyskar upprunayrkingar.

Tú, sum ert so bersøgin, manst fyrigeva mær, at eg her endurtaki, at tað var at undrast á, at mentamaður sum tú setir slíkt á prent sum, at *"íslendski sangskúlin nú skal læra føroyingar at syngja, soleiðis sum íslendingar syngja" og "danskir organistar læra okkum at spæla orgul, sum tey gera í Danmark".* Í báðum førum er talan jú um alheims tónleikamentan.

Sjálvandi er tað mest kvæðaløgini, tú hevur í huga, tá tú málbert teg um *"okkara musikalska móðurmál"*, og samdir kunnu vit vera um tað, at kvæðastevið er nakað eyðkent føroyskt; men samstundis mugu vit viðganga, at meginparturin av tí, sum, helst norðanfyri, hevur verið framborið á dansigólvi tey seinastu 200 árini — hugsi her um donsku kempuvísurnar — er innflutt arvagóðs. Eisini serføroyski kingosangurin hevur sín uppruna uttanlendis, og samanumtikið verður tað ikki nógv, sum hjá okkum heldur enn aðrastaðni einans er sprottið úr egnum heimajørðildi.

*"Jógvan Waagstein og Hans J. Højgaard dugdu ikki at kvøða og dansa og løgdu heldur einki í tað".* Man J. Waagstein ungur í Klaksvík seinast í 1800-talinum ikki hava verið við í føroyskum dansi og havt oyra fyri kvøðing og kvæðaløgum? Ið hvussu er, skrivar hann hugtikin um, hvussu "teir gomlu" kvóðu og dansaðu.

Hans J. Højgaard var úr sera góðum kingo- og kvæðabergi brotin. Kann her nevna eina løtu, Hans Jákup, Poul Eide og eg vóru bodnir oman til Karl Clausen á Hotel Hafnia. Prátið kom tá inn á kvøðing og kvæðaløg. Mitt á degi tók seg tá stemningurin ófort upp, har hvør av teimum báðum legði annan eftir í at bera fram kvæðaog vísudømi, og treystliga fullu teir í hvør við øðrum.

Jú, víst kendi H.J. Højgaard til, hvussu teir kvóðu á Toftum í gomlum døgum. At hann skal hava rikið teg sum smádrong á dyr úr sangstovuni, tí tú kvaðst "Tá eg verði stórur", er ilt at skilja. Man tað ikki heldur vera tað, at tú ikki slapst at syngja við í barnakóri, tí tú tá ikki vart so tónatryggur, sum tú nú vilt vera?

Hvussu kanst tú, sum speirekur tær royndir, sum hava verið við kvøðing innan føroyskan kórsang (sí "Skáan" 17.februar), geva okkara rokktónleikarum ábreiðslu fyri, at so lítil føroyskur tóni er at hoyra í teirra musikki, og hvussu kanst tú leggja tónleikafrálæruni tað til last ? Ungdómurin eins og vit øll onnur fáa jú frá morgni til myrkurs tútað oyruni full av amerikanskum og amerikaniseraðum poppi, og tað skal heilt serligur áhugi og vilji til at kunna fóta sær við nøkrum serføroyskum í hesum einstáttaða fjølmiðlaborna musikalska ágangi.

Gleðiligt er tað tó, at tað bæði innan tann seriøsa og undirhaldstónleikin verða gjørdar royndir við føroyskari eyðmerking. Vit eiga tó at gera okkum greitt, at viðgerð av upprunaligum kvæða- og vísuløgum má fara fram við størsta skynsemi, skal tað ikki fáa avlagandi fylgjur fyri løgini.

Tú tvíheldur um, a*t kvøðing og dansur skulu gerast serstøk lærugrein í musikkskúlanum og í læraraskúlans tónleikaundirvísing.* Tey skeið, sum Árni Dahl vegna Mentamálastýrið hevur hildið við áhugaðum lærarum, har ymsir tættir innan kvæða- og dansiheimin hava verið til viðgerðar, og har luttakararnir hava fingið við sær aftur tilfar til skúlabrúks, hava verið vekjandi og gagnlig. Ynskiligt kundi verið, at eisini meginfelagið "Sláið ring" tók stig til slíkar samkomur, har okkara góðu dansifólk í felag viðgjørdu alt, sum kann verda dansinum til frama.

Í tí sambandi kundi Fróðskaparsetur Føroya og Útvarp Føroya givið hesum fólkum, sum betri enn onnur duga at meta um kvøðing og føroyskan fólkasang annars, atgongd til teirra upptøkur frá eldri og yngri tíð við uppalandi útgávum fyri eyga. Eisini kundu í samvinnu við Sjónvarp Føroya serstakar videoupptøkur verið gjørdar, sum m.a. vístu, hvussu fólk ymsastaðni í landinum taka hendur saman og stíga til í dansi, tí enn er sjónligur munur á. Autentiska fyrimyndin er besti lærararin; men at *senda sang- og musikklærarar á nakra daga kingo- og kvøðingarskeið*, sum tú mælir til í "Skáanum", tað er dømt til at miseydnast.

Ikki tær at siga, Eyðun, so er okkara dansur ikki fólkatónleikur og koreografiskt fyribrigdi burturav, so sum fólkamusikkur og — dansur er tað aðrastaðni. Føroyskur dansur er ein heild av frásøgn, tónum og kropsligari rørslu, hevur fingið sítt heildarskap í fólkinum og kann bert varðveitast í sínum forna líki, um tey ungu fáa samband við tað umhvørvi, har dansurin enn livir sítt aldargamla lív. Tí er tað so umráðandi, at tey, sum nú gera eitt dygdargott arbeiði vid at kvøða og dansa við børnum og ungdómi, søkja sær samband við og fáa undirtøku frá góðum dansifólki á staðnum. Samvinna millum skúlar og dansiumhvørvi er besta trygd fyri, at mergjaða kvæðastevið framhaldandi verður lívgandi táttur í føroyskum mentanar- og samfelagslívi.

# Eitt meginland

**Steinbjørn B. Jacobsen**



Nógv og langt kjak var, áðrenn brúgvin um Streymin var løgd. Skjótari var at fáa bergholið í Eysturoynni.

Ikki vóru tað øll, sum sóu allar framtíðarmøguleikarnar við hesum veldigu íløgum. Men at báðar tær størstu oyggjarnar vóru bundnar saman og at fjarleikin frá høvuðsstaðnum til ytsta pláss ikki var meir enn ein góðan tíma, hevur á nógvum økjum havt ovurstóran týdning. Nú kanst tú eins væl búgva á Eiði, Fuglafirði ella á Strondum sum búgva í Tórshavn. Tórshavn er ikki bara Tórshavn fyri havnafólk, ella ein høvuðsstaður, sum fólk bara vitja so av og á. Havnin er eins nógv býurin hjá øllum íbúgvarunum í Eysturoynni og Streymoynni.

Allur framburðurin og øll tey nýggju húsini í Eysturoynni og Sundalagnum høvdu neyvan verið, um samferðslan ikki var útbygd. Hon kostaði nógv, men tað hevði kostað okkum dýrt, vit høvdu ikki verið bótafør, um hesar íløgur ikki vóru gjørdar. Tú torir næstan hvørki at hugsa ella skrivað tað, at øll hesi nýggju húsini og virkini skuldu verið í Havnini ella als ikki sæð dagsins ljós.

Í næstu framtíð verður so landfast til Vágarnar, og eru tær tríggjar størstu oyggjarnar tá bundnar saman til eitt enn størri meginland. Hetta vil geva øllum umráðnum ótrúliga nógvar og ymsar møguleikar.

Her er og verður loysunarorðið nýhugsan. Nógv hugsa kanska, at tað eru vágafólk, sum mugu hugsa nýtt, tað skulu tey eisini, kanska lært av fuglfirðingum og t.d. bygt eitt »Kambsdal«, kanska tvey, men møguleikarnir í undirsjóartunlinum kunnu sanniliga og eiga tað eisini at brúkast av restini av økinum, ikki minst Havnini. Gloymast má heldur ikki Vestmanna, nú verður lætt hjá teimum at fara vestur um sundið.

Havnin verður sjálvandi at veksa enn eina tíð, men verður rætt atborðið, kann Vágoyggin sanniliga taka nógv av fólkavøkstrinum, sum vónandi verður í einum nýggjum frælsum Føroyum.

Mong harrans ár áðrenn fólk dugdu at hugsa um møguleikan at koma upp á mánan, segði ein vísur maður: »Tað er lættari at fara upp á mánan, enn at broyta mannahugsanina«.

Undirsjóartunnilin verður veruleiki í næstu framtíð, men tíverri verður nakað av tíð at ganga, áðrenn hann verður brúkbarur veruleiki í fólksins huga.

Tí er tað umráðandi longu nú, at fólkið í øllum trimum oyggjunum venja seg við hetta velduga frambrotið.

Tunnilin er ikki bert ein ferðsluæðr til Vágarnar og okkara einasta flogvøll, men hann gevur eitt ótal av øðrum møguleikum.

Fleir enn tíggju túsund fólk fáa væl búleikast í oynni, uttan at tað verður at kennast kvalið og trongt.

Um kommunurnar í oynni og kanska eisini Vestmanna løgdu saman í eina kommunu, stóðu tær sterkari. Ein nýggj byrjan, eitt nýtt støði var tá lagt, sum eisini kundi verið ein eyka drívkraft fyri framtíðina í økinum.

Ein klárur boðskapur um at farið var til verkar.